# Sóljan fær góða undirtøku

**4. mars 2005 var eitt ár síðani bussurin Sóljan hjá »Trivnaðargrunnurin fyri Sjúklingahotellið Tórshavn« var tikin í brúk. Longu nú hava góð 2100 fólk verið túr við honum**



*Fólk á myndini: Petur Petersen, bilførari, Tummas Ejdesgaard, Anja Ejdesgaard, Anetta Ejdesgaard, vitjandi á hotellinum, og Niels Jacob Nielsen, formaður og bilførari*

*Mynd: Símun J. Hansen*

Bussurin er serliga ætlaður teimum sum í drúgva tíð búgva á Sjúklingahotellinum Tórshavn, so tey kunna stytta sær stundir og uppliva okkurt annað enn bert hotellið og Ríkissjúkrahúsið. Útferðir verða gjørdar til aðrar býir sum t.d. Hillerød, Helsingør, Roskilde og Malmø, har tey kunna vitja søvn ella vera við til onkur tiltøk.

Bussurin, sum nú hevur eitt ár á baki, varð tikin í brúk 4. mars í 2004. Talan er um brúktan Mercedes-Benz Sprinter til 9 pers. við øllum hentleikum.

Tað er »Trivnaðargrunnurin fyri Sjúklingahotellið Tórshavn«, sum eigur bussin. Kári Petersen fotografur í Havn er formaður í grunninum, og hann fekk saman við øðrum góðum fólki hendan grunn í lag. Hesin grunnur rindar allar fastar útreiðslur av bussinum.

Í Keypmannahavn hevur Niels Jacob Nielsen, formaður í »Trivnaðarnevndini fyri Sjúklingahotellið Tórshavn«, bussin um hendi. Hendan nevndin hevur til endamáls at hava bussin at koyra regluliga eini 2-3 túrar um vikuna. Eisini er ætlanin at nevndin skipar fyri hugnaløtum av ymsum slag á hotellinum.

Umleið 2100 fólk hava koyrt við bussinum, sum nevndin hevur givið navnið Sóljan. Ásannast skal at ikki altíð er lætt at manna bussin við sjálvbodnum førarum, men tann stóra fjøld av fólki, sum hevur verið við bussinum, bendir týðiliga á, at hetta tiltak er komið væl við hjá sjúklingunum og teirra avvarðandi. Formaðurin Niels Jacob vónar tí at fleiri bjóða seg til at koyra túrar við honum.

# Kroppurin er dugnaligur til leking

**– Eg havi lært, hvussu fantastiska dugnaligur kroppurin er til leking bert við at lurta eftir teimum boðum, hann gevur okkum, sigur Unn Dimon, sum í apríl mánaði skipar fyri skeiði í sjálvsmenning í Føroyum**

SJÁLVSMENNING

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

_ Eg hoyri og merki, hvussu átroðkandi tað er fyri hvørt einastakt menniskja at finna frið, hava frið og vera í friði. Hetta sigur Unn Dimon, sum 22. og 23. apríl fer at skipa fyri sjálvsmenningarskeiði í Føroyum. Hon vísir á, at kroppurin goymir øll minni, bæi tey góðu og tey minnu góðu – heilt frá barnsbeini av.

Sum nýútbúgvin fýsioterapeutur undraðist hon ofta á, hví sagt varð um sjúklingar, »at henni bagir einki – hon er hysterisk,« ella at »hann kemur bara til viðgerð, tí hann vil hava massagu«, ella sum tað varð tikið til, at »blíva berørdur…«. Hetta varð ofta sagt í einum negativum tónalag, sum um sjúklingurin bara lat sum um, og hetta skuldu vit lættliga avdúkað. Men hetta fall mær fyri bróstið, sigur Unn Dimon.

– Tað er hetta, sum hevur eggjað mær til at ganga aðrar leiðir og betur skilja sambandið millum fysiska og psykiska kroppin, sigur hon.

At hava eina útbúgving sum fysioterapeutur hevur lært Unn Dimon ógvuliga nógv um kroppin.

– Eg havi lært, hvussu fantastiska dugnaligur hann er til leking bert við at lurta eftir teimum boðum, hann gevur okkum, sigur hon.

Men sjálvandi er hetta ikki so einfalt, sum tað ljóðar.

– Trupult er hjá okkum at síggja allan veruleikan, sum hann er, tí er tað ógvuliga gott, at vit av og á síggja veruleikan frá einum øðrum sjónarmiði og harvið víðka okkara fatan, heldur hon.

Unn Dimon sigur, at vit vita at kroppurin goymir øll minni – heilt frá barnsbeini av.

– Møguleiki er eisini umvegis kroppin og professionellum stuðli at lekja og minka um tey tungu minnini.

Sjálvsagt er tað ógvuliga umrádandi við samstarvi, tað verði seg innan tað konventionella medesinska og tad alternativa.

Tað finnast nógvir ymiskir vegir at røkka sama máli, bæði munnligt, kroppsligt, kreativt o.s.fr., heldur hon.

– Eg eri sjálv í ferð við eina útbúgving, sum kallast »symbolpedagogur«, har dentur verður lagdur á at stimbra áhugan hjá tí einstaka at vilja skapa, t. d yrkja, mála, skriva søgur ella ævintýr, syngja o.s.fr.

Tað er júst via tín egna skapanarhuga, at tú búnast og blómar, fær megi at liva og lættari møta trupulleikum í tí dagliga, sigur Unn Dimon.

– Einki er so gott sum at fara ein túr í hagan ella oman í mølina, tá skapast nakað gott innan í mær.

Endamálið við mínum skeiði er at lata upp fyri øllum hesum møguleikum, sigur Unn Dimon

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo